Nósi heldur føðingardag frá 11. til 15. september og tú kanst uppliva bæði Nósa og Trøllapætur í fullari ferð.

Kom inn í Føroya Banka og tøm Nósan hjá tær, so fært tú eisini eina føðingardagsgávu.



Kemur tú við?

Nósi vitjar á øllum deildum niðanfyri. Nósi og Trøllapætur vitja deildirnar, ið eru merktar við stjørnu:

| | | |
|---|---|---|
| ***Norðuroyggjar*** | | |
| * Klaksvík | Mánadagin | kl. 10.30-11.00 |
| * Klaksvík | Mánadagin | kl. 14.30-15.30 |
| ***Eysturoy*** | | |
| Eiði | Mánadagin | kl. 13.00-13.30 |
| Norðskáli | Mánadagin | kl. 14.30-15.30 |
| * Gøta | Týsdagin | kl. 13.00-14.00 |
| * Leirvík | Týsdagin | kl. 14.30-15.30 |
| Fuglafjørður | Mikudagin | kl. 14.30-15.30 |
| Saltangará | Hósdagin | kl. 10.30-11.00 |
| Toftir | Hósdagin | kl. 14.30-15.30 |
| Skáli | Fríggjadagin | kl. 13.00.14.00 |
| Strendur | Fríggjadagin | kl. 14.30-15.30 |
| ***Vágar*** | | |
| Miðvágur | Hósdagin | kl. 15.00-16.00 |
| Sandavágur | Hósdagin | kl. 16.30-17.30 |
| * Sørvágur | Fríggjadagin | kl. 14.00-15.00 |
| ***Sandoy*** | | |
| Skopun | Fríggjadagin | kl. 14.00-14.30 |
| Sandur | Fríggjadagin | kl. 15.00-15.30 |
| ***Suðuroy*** | | |
| Vágur | Mánadagin | kl. 10.30-11.00 |
| Hvalba | Mánadagin | kl. 13.00-14.00 |
| Vágur | Mánadagin | kl. 15.00-15.30 |
| Tvøroyri | Týsdagin | kl. 14.30-15.30 |
| ***Streymoy*** | | |
| Kollafjørður | Týsdagin | kl. 14.30-15.30 |
| * Vestmanna | Mikudagin | kl. 14.30-15.30 |
| * N. Finsensgøta | Hósdagin | kl. 10.30-11.30 |
| Hornabøur | Hósdagin | kl. 12.30-13.30 |
| * SMS | Hósdagin | kl. 14.30-15.30 |
| * N. Finsensgøta | Hósdagin | kl. 16.30-17.30 |

stephanssons hús

FØROYA BANKI




# Birita vorðin leiðari

Nú skal Birita Krossteig royna at fáa meira lív í Sjónleikarhúsið í Havn.

Fyri einari viku síðani byrjaði hon sum dagligur leiðari, og hon æltar at leggja seg eftir, at fáa meira virksemið í Sjónleikarhúsinum.

Havnar Sjónleikarfelag hevur verið virkið seinastu árini, og felagið hevur á hvørjum ári sett leikir upp. Umfamt hetta eru onnur tiltøk í húsinum. Tað er orkukrevjandi at skipa fyri øllum hesum, og tí hevru sjónleikarfelagið avgjørt at seta ein dagligan leiðara.

# Ársfundur Útnorðurráðsins í Føroyum

Útnorðurráðið helt ársfund sín í Havn í døgunum 4. til 7. september. Á fundinum var nýggjur formansskapur valdur við Ole Lynge, landstingsformanni, sum formanni, Árna Johnsen, altingsmanni, sum 1. næstformanni og Jógvan Durhuus, løgtingsmanni, sum 2. næstformanni.

Evni á fundinum var samstarv hjá vinnulívinum í Útnorði, har landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, og leiðarin í NORA, Kjartan Hoydal, høvdu framløgu. Landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen, hvør á sínum øki, kunnaðu um samstarv myndugleikanna í Útnorði.

Ráðið samtykti á fundinum tvær tilráðingar innan mentanarøkið. Ráðið samtykti at mæla landsstýrum/stjórn í londunum í Útnorði at seta skjøtil á skjalprógv og skriving av felagssøgu landanna í Útnorði, og at evna til eina felags Útnorður virkisætlan innan norrøna mentanarøkið. Báðar tilráðingarnar botnaðu í mentanarráðstevnu ráðsins, sum hildin var í Suðurgrønlandi í juli í ár.

Somuleiðis samtykti ráðið at søkja um eygleiðarastøðu í Standing Committee of Parliamentarians of the Arctic Regions. Á fundinum varð m.a. tosað um, hvussu samskifti millum íbúgvararnar í londunum kundi fremjast. Í hesum sambandi samtykti ráðið at gera uppskot til verkætlan fyri ársfundin 2001, sum hevur til endamáls at knýta tættari bond millum íbúgvararnar í londunum.

Ár 2001 verður veiðiár Útnorðurs, har ráðið í stóran mun fer at leggja dentin á samstarvið landanna millum viðvíkjandi veiði. Í hesum sambandi fer ráðið at skipa fyri eini veiðiráðstevnu í Íslandi í juni 2001. Eftir áheitan frá Útnorðurráðnum arbeiða tey norrønu húsini í Útnorði og Nordens Institut í Grønlandi við tilrættaslegging av eini stórari veiðiframsýning, sum letur upp í 2002. Framsýningin verður í londunum í Útnorði og Skotlandi, Kanada og møguliga teimum baltisku londunum og Skandinavia.

Á ársfundinum varð samtykt, at ferðsla verður evni á ársfundinum 2002. Upplýsingar, sum komu fram á fundinum um niðurlegging av flogrutum millum Ísland og Grønland, ørkymlaðu ráðið. Útnorðurráðið samtykti tí eina orðing til ferðslumálaráðharrarnar í londunum, har heitt varð á teir um at arbeiða fyri at tryggja, at flogruturnar millum Ísland og Narsarsuaq og Ísland og Kulusuk kundu halda fram.

Heimasíða Útnorðurráðsins: www.vestnordisk.is

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skrivararnar í sendinevndunum.



# Samráðast í Keypmannahavn

*Hóast landsstýrið ætlaði komandi samráðingarnar um ríkisrættarligu støðuna at vera í Føroyum, er nú endaliga avgjørt, at fundurin verður í Keypmannahavn 26. oktober*



*Enn einaferð verða løgmaður og fylgi hansara á útivølli, tá samráðast skal um ríkisrættarligu støðuna 26. oktober*

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður og fylgi noyðast enn einaferð til Danmarkar í forsætismálaráðið at samráðast um fullveldisætlanina á útivølli.

Hetta er greitt eftir at løgmaður 5. september sendi danska forsætisráðharranum bræv, har hann staðfestir, at samráðingarnar verða í Danmark sum avtalað í telefonsamrøðu frammanundan.

Á seinasta samráðingarfundinum, sum var tann triði í røðini, samdust partarnir annars um, at fjóðri samráðingarfundurin skuldi haldast í Føroyum. Seinni komu so boð frá forsætisráðharranum til løgmans um, at best var at halda fundin í oktober, tí ikki bar til at savna donsku lykla-ráðharrarnar fyrr enn eftir fólkaatkvøðuna um evruna.

### Kunnu kortini ikki savnast

Donsku lyklaráðharrarnir í fullveldissamráðingunum kundu kortini heldur ikki savnast til at koma til Føroya í oktober. Tí hevur danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, gjøgnum telefon boðað løgmanni frá, at tað liggur best fyri at halda samráðingarfundin í Keypmannahavn 26. oktober.

Hesum tekur løgmaður undir við, men í brævinum til forsætisráðharran vísir hann á sína ónøgd um hesa avgerð. Løgmaður sigur seg undrast yvir, at hann er noyddur at staðfesta, at tað ikki ber til hjá forsætisráðharranum at halda lyftið um, at samráðingarnar skuldu fara fram í Føroyum.

### Skulu hava úrslit

Løgmaður ætlar sær at samráðingarfundurin í oktober skal geva endaligt úrslit á trimum økjum. Samráðst skal liðugt um ríkisborgararætt og borgararættindi, gjaldoyrasamstarv og umsitingarligt samstarv.

Fyri at náa hesum máli skjýtur løgmaður upp, at spurningurin um skiftistíð ikki kemur á dagsskránna.

Løgmaður vísir á, at tá landsstýrið kann staðfesta, at stjórnin ikki vil samráðast um eina hóskandi skiftistíð hóast avtaluna frá juni 1998, ætlar landsstýrið sær frameftir at arbeiða sjálvstøðugt við hesum máli.

### Skulu hava ávegis samráðingar

Áðrenn samráðingarfundin 26.oktober er ætlanin, at danskir ráðharrar og føroyskir landsstýrismenn skulu møtast til at samráðast um ávísar spurningar í ríkisrættarligu samráðingunum.

Løgmaður skjýtur upp, at Frank Jensen, løgmálaráðharri, og Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, hittast at samráðast um borgararættindi og ríkisborgararætt.

Marianne Jelved, búskaparráðharri, og Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, skulu eftir evruvalið hittast at samráðast um gjaldoyrasamstav.

Løgmaður vónar, at hetta fer at gera samráðingarnar 26. oktober munandi léttari.

# Grundlógin skal kunna brúkast

*Grundlógarnevndin heldur, at ein føroysk grundlóg eigur at gerast soleiðis, at hon er nakað fólk kunnu vísa til. Talan skal ikki vera um eitt pappír á vegginum*

JOHN JOHANNESSEN

Ein føroysk grundlóg skal kunna brúkast í gerandisdegnum. Hon skal ikki bert vera ein lóg í eini glasmontru, eins og til dømis danska grundlógin.

Hetta er grundlógarnevndin, sum í løtuni leggur lunnar undir føroyska grundlóg, samd um.

Rúni Joensen, sum er formaður í tí arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt virknið hjá einari komandi føroyskari grundlóg, sigur tað vera umráðandi at gera sær greitt, um grundlógin er nakað vit ynskja at brúka í gerandisdegnum ella ikki.

– Okkara niðurstøða í nevndini er, at ein føroysk grundlóg skal vera til at brúka, staðfestir Rúni Joensen.

### Fólkið eigur valdið

At gera eina føroyska grundlóg, sum skal virka í gerandisdegnum hjá einstaka føroyinginum, bæði høgum og lágum, setir krøv til grundlógarnevndina.

– Tað er fólkið, ið skal seta karmarnar, tí evsta valdið skal liggja hjá fólkinum, sigur Rúni Joensen.

Tí er tað, at grundlógarnevndin leggur so stóran dent á at kunna um arbeiðið í nevndini. Fólkið skal vita hvat gongur fyri seg og takast upp á ráð.

Rúni Joensen vísir á, at vanligi føroyingurin sjáldan hugsar um stýrisskipanarlógina og donsku grundlógina, sum eisini er okkara grundlóg, í gerandisdegnum. Orsøkina heldur hann vera, at fólkið ikki hevur verið við til at gjørt hesar lógir og tískil heldur ongar kenslur hevur fyri teimum.

– Í 1957 skuldu føroyingar atkvøða um nakrar broytingar í donsku grundlógini. Men fá vóru á vali. Hetta er uttan iva tí, at talan var um eina lóg, ið var fremmand fyri fólkinum, sigur Rúni Joensen.

### Grundlógin í lummanum

Í USA er heilt vanligt, at fólk vísa til grundlógina, tá tey kenna seg vera órættvíst viðfarin. Harafturímóti kemur slíkt nærum ikki fyri í Føroyum og Danmark.

Orsøkina til hetta heldur Rúni Joensen vera, at fólkið ikki er tikið við upp á ráð, tá danska grundlógin varð gjørd.

Men føroyska fólkið skal komandi mánaðirnar takast væl og virðiliga upp á ráð í sambandi við arbeiðið at gera føroyska grundlóg. Og úrslitið av hesum vónar grundlógarnevndin verður, at føroyska grundlógin verður nakað, fólk hava eina kenslu fyri og brúka.


FRIMÆRKER SØGES!



*Til vor frimærkeauktion i november søges:*

Gamle breve til og fra Færøerne, gamle postkort, fragtbreve og andet posthistorisk materiale samt frimærkesamlinger af enhver art og størrelse.

Netop nu opnår vi gode priser hos vort internationale publikum.

Kontakt os derfor snarest for en uforpligtende samtale/vurdering.

Vi forventer at besøge Færøerne i september.

Tlf. 0045 86 11 47 11

CRAFOORD

NELLEMANN & THOMSEN

Skanderborgvej 104 · 8260 Viby J · Tlf. 8611 47 11